## Fulltrúastarv
á
## Landsskrivstovuni

Á Undirvísingar- og mentamáladeildini á Landsskrivstovuni er eitt starv sum fulltrúi leyst at seta frá 1. august 1991.

Tann, ið sett/ur verður, skal í høvuðsheitum arbeiða við undirvísingar- og útbúgvingarmálum, ítróttarmálum og ungdóms- og bygdarhúsmálum — og eisini við øðrum málum, herundir mentamálum, sum koma inn undir arbeiðsøki deildarinnar.

Umsøkjarar skulu hava løgfrøðiligt ella búskaparfrøðiligt embætisprógv.

Viðmerkjast kann, at setanarøkið hjá fulltrúanum fevnir um alla Landsskrivstovuna, og tann, ið sett/ur verður, hevur skyldu at taka við starvi innan onnur málsøki á Undirvísingar- og mentamáladeildini ella á øðrum deildum.

Lesandi, sum verða liðug í næstum, kunnu eisini søkja.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Jákup Thorsteinsson, undirvísingar- og mentamálastjóra.

Umsóknir við avritum av prógvum og ummælum skulu vera landsstýrinum í hendi í seinasta lagi 28. juni 1991.

**Á Landsskrivstovuni**
*tann 10. juni 1991*

## Tvangsauktion

På dommerkontoret, C. Pløyensgøta 1, Tórshavn afholdes

**Fredag den 28. juni 1991 kl. 11.10**

tvangsauktion over matr.nr. 1 oi Hoyvík tilhørende P/F Berg Motors, P/F Eysturoyar Bilsøla, P/F Bilservice og P/F Johannes Berg, alle under konkurs.

Auktionen er begæret af advokat Páll Nielsen, Advokatvirkið, Hoyvíksvegur 27, Tórshavn telefon 1.2171 på vegne konkursboet.

Ejendommen er en erhvervsejendom opført i 1989 på en 4202 m² stor grund. Det bebyggede areal udgør 800 m² i 2 etager.

Ejendommen kan beses efter aftale med ovennævnte advokat.

Auktionsdokumenterne ligger til gennemsyn på dommerkontoret.

**Færøernes fogedret,**
*10.06.1991*
**Lasse S. Christensen**
**fm.**

# Ongan kaffimunn

## *- ella bensin á bilin í Hvalba, sum nýggjur faldari annars upplýsir ferðafólkum um*

Tað er ikki sum at siga tað, at finna fram til tey støð í Føroyum, sum ókunnug ferðafólk av sínum eintingum vilja vitja í Føroyum.

Eingin umfevnandi ferðamannafaldari er til, men so kunnu vit altíð stuðla okkum til serkøn innan ferðavinnu í grannalondunum.

Herfyri kom faldarin "Around The Faroe Islands' 91," sum Nesútgáfan sf. í Reykjavík nú gevur út á triðja ári.

Øll hugsandi feløg og fyritøkur, peningastovnar o.s.fr. í Føroyum hava lýst í faldaranum, sum eisini upplýsir um, hvar ferðafólk kunnu leita sær til, tá tey vitja á bygdum og í bý.

Ikki allar upplýsingar eru eftirfarandi, og tað er torført at ímynda sær, hvussu fremmanda ferðafólk kenna tað, tá tey t.d. koma til Hvalbiar.


Í faldaranum undir Hvalba er teigur, sum nevnist: Facilities in Hvalba. Har stendur t.d.: Rutukafein, Hoydalsvegur 19 og Statoil Servicestøðin FR-410 Kollafjørður.


Ferðafólk kunnu eisini fara útferðir til gongu eftir teimum gøtum, sum eru merktar á korti yvir einstøku støðini.


Undir Hiking (gongutúrar) stendur m.a.: Ferðandi skulu hava kort, kumpas, floytu og fyrstuhjálpar útgerð við. Gøturnar eru týðiliga merktar, og at fjøllini ofta eru merkt við varðum.


Kort eru til keyps í Kunningarstovuni og Alduni, umframt í H.N.J. Bókhandli, sum t.d. eru 1:20.000. Kortini hava bert danskan tekst.

Trupulleikin er bert, at um tú t.d. keypir kort at fara til Kirkjubøar úr Havnini, so er tað neyðugt at nýta trý kort á 54x57 cm, og um tú t.d. ætlar tær at ferðast til gongu í Suðuroy, er neyðugt at hava átta av hesum kortum uppi á tær. Hvørt kortið kostar 40 krónur.




*Fyri at fáa faldaran til ferðafólkini, ið koma til Føroya so fullfíggjaðan sum gjørligt, er føroyakort prentað. Hvussu ørkymlandi fremmandanfólk halda Føroyar mynda seg, sæst einamest av, at ein peningastovnur hevur fingið pláss vestanfyri og deildir teirra eystanfyri á landgrunninum*

Spurningurin er so eisini, hvussu væl merktir hesir gongu túrar eru og um varðar eru allastaðni at miðja seg eftir millum bygdir.

Tað er Einar Matthiasson, sum eigur virkið Nesútgáfan sf. í Reykjavík. Hann sigur við Sosialin, at hann annars hevur gjørt slíkar ferðamanna faldarar í Íslandi, og tí hugsaði at tað var eitt gott hugskot eisini at royan seg í Føroyum.

Einar Matthiasson er ikki greiður yvir, at prentvillur eru komnar í føroyska faldaran í ár, sum tað at hvalbingar hava møguleika at bjóða ferðafólki inn at fáa ein kaffimunn í Rutukafeini í Gundadali og at ferðafólk í bili kunnu keypa bensin á Servicestøðini í Kollafirði - í Hvalba.

Einar Mathiasson er annars væl nøgdur við føroyska faldaran, men heldur at slíkar prentvillur, sum hesar, nærum eru ógjørligar at sleppa undan.

Faldarin er prentaður í 25000 eintøkum og verður latin brúkararum ókeypis um allan heim, har áhugi er fyri Føroyum.

**Dagny**